Skjal 10

# Viðmerkingar til til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð og til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m.

Fysioterapeutfealg Føroya halda at nógv gott er í uppskotinum til løgtingslógv um almannatrygd og vælferð. Serliga gott at samstarv og kontinuitetin millum land og kommunur er staðfest, og at ein virkisætlan **§ 33** skal gerast. Vit eru eisini sera glað fyri at viðlíkahaldsvenjingin **§ 38** verður lógartryggja. Fyri at tryggja at so nógvir borgarar í Føroyum hava atgongd til veitingarnar, tey fáa tilluta, er tað eisini av alstórum týdningi at flutningstænastan **§ 43** verður sett í verk. Hendan tænastan kann gera arbeiði hjá fysioterapeutum nógv meira effektiv og fer ikki so nógv spill tíð við at koyra út til borgararnar.

***§ 29*** *Stk. 3. Hóast ásetingina í stk. 1 og 2 kann hjálparráð sbrt. stk. 1 veitast fyribils í sambandi við endurvenjing frá Almannaverkinum.*

Vit eru sera glað fyri at hetta er komi við í nýggju lógina og kann gera okkara arbeiði nógv effektivari og meira málrætta, men samstundist undrast vit á, at tað einans er gladandi fyri persónar millum 18 og 67 ár, sum fáa endurvenjing frá Almannaverkinum. Vit meta at hetta hevur líka stóran týdning hjá øllum borgarum, sum fáa endurvenjing óðansæð aldur ella hvar endurvenjingin verður veitt.

Vit halda at samstarvið millum heimarøkt og stuðulstænastuna kann blíva problematisk tá man hugsar um gerandisrehabilitering. AV veitur stuðul og kommunurnar veita røkt. Í einari gerandisrehabiliterandi tilgongd kann ein borgari hava brúk fyri stuðul til røkt. Borgarin kann klára persónliga røkt heilt ella partvíst, men einans um hann verður stuðlaður ella vegleiddur til hetta. Hvør skal so inn yvir hesa uppgávuna? Ella skulu bæði stuðlar og heimarøkt taka sær av hesi uppgávu alt eftir um persónurin skal hava fysiska hjálp ella verða stuðlaður til hetta?

Ella um ein borgari er noksu sjálvhjálpin og skal stuðlast til gerandisrehabilitering. Koma stuðlarnir hjá AV at veita hesa tænastu? Tí hetta kemur ikki altíð undir røkt.

***Endurvenjing***
***§ 37.*** *Endurvenjing verður veitt persóni í aldrinum 18 ár upp til fólkapensjónsaldur, sum vegna mistan førleika tørvar endurvenjing. Endurvenjing verður veitt við tí endamáli, at persónur:*
*1) kann fáa ella varðveita tilknýtið til arbeiðsmarknaðin, ella*
*2) kann klára seg uttan hjálp ella við minni hjálp frá Almannaverkinum.*

Vit halda at tad skuldi verid broytt til:

**Endamálið er at persónurin kann endurvinna mistar førleikar, so hann kann liva eitt so sjálvstøðugt og virkið lív sum gjørligt.**

Vit meta, at málbólkurin er ov snævur, tí so verða tað mong, ið fella uttanfyri og onga endurvenjing fáa, hóast tørv.

***Viðlíkahaldsvenjing***
***§ 38.** Viðlíkahaldsvenjing verður veitt persóni í aldrinum 18 ár upp til fólkapensjónsaldur, sum orsakað av breki ella sjúku hevur týðandi og varandi skert virkisføri, ið munandi víkir frá aldurssvarandi virkisføri, og hevur týðandi ávirkan á sjálvhjálpni.*
*Stk. 2. Viðlíkahaldsvenjing verður veitt við tí endamáli at tryggja verandi virkisførleika og fyribyrgja og útseta, at virkisførleikin versnar soleiðis, at persónur:*

1) *kann fáa ella fasthalda tilknýti til arbeiðsmarknaðin, ella*
2) *klárar seg uttan, ella við minni hjálp frá Almannaverkinum.*

Vit halda at tad skuldi verid broytt til:

**Endamálið er at persónurin kann viðlíkahalda førleikar, so hann kann liva eitt so sjálvstøðugt og virkið lív sum gjørligt.**

Vit meta, at málbólkurin er ov snævur, tí so verða tað mong, ið fella uttanfyri og onga viðlíkahaldsvenjing fáa, hóast tørv.

# Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m.

Í lógini um heimatænastu stendur at kommunurnar kunnu taka gjald fyri tænastur og tilboð **§18**. Hetta kann hava óheldigar avleiðingar fyri pensjónistar, sum ikki hava ráð ella ikki vilja gjalda fyri tænastur og tilboð frá kommununum, td. endurvenjing ella viðlíkahaldsvenjing. Tað er eisini ymiskt frá kommunu til kommunu hvat tær taka fyri tær ymisku tænasturnar og tilboðini. Hetta kann hava við sær at bara tey sum eru best fyri peningaliga, fáa tað neyðugu venjingina. Hetta kann eisini skapa ójavna millum ymisku kommunurnar í Føroyum.

Vit mæla til at hetta verður broytt so at kommunurnar ikki kunnu taka gjald fyri endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing. Ella í minsta lagi at man setur eitt loft á hvussu nógv man kann taka fyri hesar veitingar.

*"**§ 10.** Kommunurnar veita heimabúgvandi fólkapensjónistum og persónum, ið hava varandi sjúku, ið er progressiv og degenererandi, tænastur, ið kunnu stimbra viðkomandi likamliga, sálarliga og sosialt soleiðis, at hann kann búgva í egnum heimi sum longst.*

Vit halda, at fyri tað fyrsta, er hetta ein stórur sjúklingabólkur (sjá "Diagnoseliste med klassificering af progressive sygdomme" frá sst.dk). Um allur hesin bólkur framyvir skal fáa tænastuveitingar frá kommununum, kann tað bert læta seg gera, um peningur fylgir við. Umframt tað, má málbólkurin skilgreinast nágreiniliga, fyri at umgangast misskiljingar.

*"**§ 10 a.** Kommunurnar veita endurvenjing til heimabúgvandi fólkapensjónistar, ið vegna mistan førleika tørva endurvenjing. Endurvenjing verður veitt við tí endamáli, at fólkapensjónisturin:*
*1) kann búgva heima sum longst, og*

*2) kann klára seg uttan hjálp ella við minni hjálp frá kommununi."*

Uppskotið um at kommunurnar nú skulu veita endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing, kemur at økja um virksemi hjá kommununum, og má tí peningur setast av til hetta.

Ístaðin fyri a) og b) eigur at standa at endamálið er:
**Endamálið er at persónurin kann endurvinna mistar førleikar, so hann kann liva eitt so sjálvstøðugt og virkið lív sum gjørligt.**

***§ 10 b.*** *Kommunurnar veita viðlíkahaldsvenjing til heimabúgvandi fólkapensjónistar, ið vegna ellisbrek ella sjúku hava týðandi og varandi skert virkisføri, ið hevur týðandi ávirkan á, hvussu sjálvhjálpin fólkapensjónisturin er.*

Ístaðin fyri sjálvhjálpin, halda vit tað skal standa: **"kann liva eitt so sjálvstøðugt og virkið lív sum gjørligt, og sostatt varðveita sjálvsavgerðarrættin".**

*Stk. 2. Viðlíkahaldsvenjing verður veitt við tí endamáli at tryggja verandi virkisførleika og fyribyrgja og útseta, at virkisførleikin versnar soleiðis, at fólkapensjónisturin:*
*1) kann búgva heima sum longst, og*

*2) kann klára seg uttan hjálp ella við minni hjálp frá kommununi.*

Ístaðin fyri 1) og 2), eigur heldur at staðið: **"kann liva eitt so sjálvstøðugt og virkið lív sum gjørligt, og sostatt varðveita sjálvsavgerðarrættin".**

Vit meta eisini, at tað hevur týdning, at tað verður orðað í lógini, at tað eru fakbólkarnir, ergoterapeutar og fysioterapeutar, sum eru veitarar av endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing.

## Aðrar viðmerkingar:

Í dag verður endurvenjing veitt í 3. geirum: Heilsuverki, Almannaverki og Kommunum, og kann hetta hava sínar avbjóðingar við sær í mun til markamót.
Vit halda, at uppbítingin av endurvenjingini átti at verðið býtt upp í serkøna- og almenna endurvenjing, har **serkøna** endurvenjingin átti at verið í Heilsuverkinum og **almenna** endurvenjingin átti at verið í Almannaverkinum og Kommununum.

**Serkøn** endurvenjing verður skilgreinað:
*"Tá sjúklingur hevur tørv á løggildum heilsustarvsfólki á sjúkrahúsgeiranum við serkunnleika til ávísar sjúkar, tá tørvur er á tvørfakligum samstarvi, og tá virkisføri hjá sjúklinginum er torgreitt, umfatandi álvarsamt og ella sjáldsamt og av týdningi fyri fleiri lívsøkir"* (Tilmæli um samskipaða endurvenjing, 2016).
**Almenn** endurvenjing verður skilgreinað sum:
*"Tá sjúklingurin tørvar hjálp frá løggildum heilsustarvsfólki við almennum førleikum, og tá ið virkisføri hjá sjúklinginum er avmarkað, uttan komplikatiónir og er einfalt at bøta um"* (ibid).
Tær avbjóðingar vit síggja í dag, er at hetta greiða uppbýtið ikki er heilt skilgreinað enn, og halda vit at eitt klárt og greitt uppbýtið, kundi verið ein loysn í mun til markamót.

Í Føroyum búgva tað bert uml. 50.000 fólk, og sjúklingbólkarnir verða smábýttir, og harafturat skal hvør sjúklingabólkur sær, hava sína serstøku endurvenjing ( sjá Kliniske Retningslinjer).
Hetta kann verða ein vansi og meinbogi fyri endurvenjingina, at tað kann koma at verða trupult, at tryggja somu, høgu fakligheit í øllum geirum.

Bólkurin av eldri eru teir borgarar, sum ofta dragast við fleiri sjúkur í senn, sum kann hava við sær, at endurvenjing á eldraøkinum kann verða fakliga avbjóðandi.
Har afturat eru nøkur kommunusamstørv smá og hava fáar ergo- og fysioterapeutar settar í starv, og tað í sær sjálvum, kann hava við sær, at tað verður trupult, at ogna sær so breiða servitan, sum skal til í fleiri førum.

Vit áttu í staðin, eins og í grannalondunum, at havt endurvenjingina á 2. geirum, Heilsuverkið fyri seg, og hin geirin veitur endurvenjing til borgarar í øllum aldri, óansæð sjúkur og brek. Hetta kundi havt við sær eina sjálvstøðuga Endurvenjingareind fyri alt landið, sum hevði servitan innan øll økir.

Fysioterapeutfelag Føroya